**Lóg fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya**

KVINNUFELAGASAMSKIPAN FØROYA (KSF)
LÓGIR

**§ 1.** Kvinnufelagasamskipan Føroya er umboðnevnd fyri kvinnufeløg, sum hava til starvsmið og mál at arbeiða fyri javnstøðu millum kvinnur og menn, so tey javnbjóðis kunnu virka í heimi, yrki og samfelagi.

**§ 2.** Kvinnufelagasamskipan Føroya arbeiðir óheft av partapolitikki.

**§ 3.** Hvørt felag sær arbeiðir sjálvstøðugt og ber útreiðslurnar av sínum egnu umboðum.

**§ 4.** Ársfundurin er hægsti myndugleiki KSF's og eigur at vera hildin í apríl/mai. Lýst verður minst 14 dagar frammanundan í fjølmiðlunum. Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu vera forkvinnuni í hendi í seinasta lagi 8 dagar fyri fundin.

**§ 5.** Ársfundurin verður skipaður soleiðis:

1. Val av fundarstjóra (fundarstjórum).
2. Val av fundarskrivara.
3. Frágreiðing frá forkvinnuni.
4. Framløga av roknskapi.
5. Frágreiðing frá feløgunum.
6. Frágreiðing frá umboðum KSF's í ymsum nevndum.
7. Fíggjareftirlitið verður lagt út til grannskoðan hjá tí felagi, sum hevur roknskapin hjá KSF.
8. Góðkenning av roknskapi og fíggjarætlan.
9. Ásetan av limagjaldi.
10. Viðgerð av innkomnum uppskotum.
11. Ymiskt.

**§ 6.** Broytingaruppskot til reglugerðina eiga at vera forkvinnuni í hendi 14 dagar áðrenn fundin.
Forkvinnan sendir uppskotini víðari til feløgnini beinanvegin.
Endaliga viðgerð og møgulig samtykt fer fram á ársfundinum.

**§ 7.** Hvørt felag velur eitt umboð og eitt eykaumboð. Hevur felag fleiri enn 100 limir, verða vald 2 umboð og 1 eykaumboð.

**§ 8.** Umboðini vera vald fyri 2 ár.

**§ 9.** Umboðsnevndin skipar seg sjálv hvørt ár við forkvinnu, næstforkvinnu, sum eisini er skrivari, og fíggjareftirlitskvinnu. Umboðsnevndina kann bert taka avgerðir, um meirilutin av umboðunum er til staðar. Allar avgerðir eru meirilutaavgerðir. Standa atkvøðurnar á jøvnum, verður atkvøðan hjá forkvinnuni avgerandi.

**§ 10.** Til raksturin hjá KSF lata feløgini eitt ávíst gjald um árið pr. lim.
Gjaldið verður ásett á ársfundinum. Limatalið við navnalista eigur at verða latið fíggjarábyrgdarkvinnuni á ársfundinum og peningurin goldin fyri árslok sama árið.
Roknskaparárið er starvsárið.

**§ 11.** Umboðini hava skyldu at møta á ársfundinum.

**§ 12.** Gerðabók verður førd á øllum umboðsnevndarfundum. Umboðini hava skyldu at geva feløgum sínum frágreiðing frá fundunum.

**§ 13.** Fíggjarábyrgdarkvinnan hevur roknskap yvir inntøkur og útreiðslur hjá samskipaniini og leggur fram grannskoðaða roknskapin á ársfundinum.

**§ 14.** Um felag ynskir at siga seg úr KSF, verður umsóknin viðgjørd og avgreidd á fyrstkomandi ársfundi.

**§ 15.** Verður Kvinnufelagasamskipan Føroya tikin av, verður á ársfundi at taka avgerð um, hvat gerast skal við ognir felagsins.

Lógin seinast broytt á ársfundi 15. mai 2010.